## Barnagarðurin á Velbastað sóknast eftir avloysara

Tímatalið verður væntandi 80 tímar um mánaðin. Arbeiðstíðin er oftast løgd til rættis, men skotbráið kann eisini verða stutt. Uppgávan er at loysa av á stovunum og talan er bæði um stuttar og langar dagar.

Barnagarðurin er opin frá 7.30 til 17.00 og hevur tríggjar stovur við 11 børnum í hvørjari. Børnini eru frá 1 – 6 ár.

**Vit vænta, at viðkomandi:**

- hevur góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- leggur dent á umsorgan
- dámar væl at verða úti

**Løn**
Starvið verður lønt eftir sáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagið 02.02.04

Nærri fæst at vita á tel. 32 81 21. lok 10: Hanna Jacobsen, leiðari ella lok.14: Borgny Jacobsen, varaleiðari.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

## Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

## AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum"?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús



Dvørgastígur 7 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel 314555 · Fax 318 026 · t-post: hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

## Skips Sosialurin - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK



**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**
Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur
KAUPTHING Føroyar Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið Sosialurin Box 76 110 Tórshavn
ÓKEYPIS Sosialurin rindar postgjaldið 64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

- ☐ *Tekst útgáva*
- ☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
- ☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin

## Vágafólk



*Hjartaliga takki eg øllum tykkum mongu, sum góvu mær so dyggan persónligan stuðul á løgtingsvalinum týsdagin*

**Edvard**

## Takk fyri stuðulin



*Hjartaliga takk fyri at tit vardu tað,sum vunnið var. Takk fyri tann stuðul tit vístu Tjóðveldisflokkinum, og mær persónliga*

**Hergeir**

## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

## Pedagogur og hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 29 tímar um vikuna frá 1. mars 2004. Lønarstig 10/16.

Einum hjálparfólki at arbeiða 29 tímar um vikuna frá 1. mars 2004. Lønarstig 1/5.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur við 2 stovum, 18 børnum í hvørjari, í aldrinum 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Hevur góð samstarvsevnir
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsan og ígongdsetandi
- Dámar væl at vera úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosað við leiðarin Súsanna á Stongum, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi seinast 9. februar 2004:

**Barnagarðurin »Sýslan«**
**FO-380 Sørvágur**

## Skrivari

**Fyri skrivara okkara verður søkt etir fólki til starvið sum skrivari fyribils í 1 ár.**

**Starvið:** Talan er um áhugavert framtíðarstarv sum skrivari fyri stjóran. Harumframt eru fleiri sjálvstøðgar uppgávur at loysa hjá skrivaranum.

**Útbúgving:** Tú skal hava royndir í at arbeiða við teldu og duga at nýta forritini Word og Excel. Ástøðilig útbúgving er góð, men er eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan skrivstovuyrkið. Góður kunnleiki til mál, og serliga føroyskt, gevur fyrimun.

**Vit bjóða tær:** Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskian í samsvari við útbúgving og royndir og góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Umsóknir:** Skrivligar umsóknir skulu sendast til:
**P/F Føroya Shell · Postboks 188**
**110 Tórshavn**, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12.02.2004.
Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Janu Rasmussen, skrivara á telefon 347400.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.Shell.fo

Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktarfrøðingur

Avloysarastarv á starvsbrøkii 0,7 í skiftandi vaktum á **D2** er leyst at søkja til setan 1. mars 2004 ella skjótast gjørligt fram til 31. august 2004.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja okkum eftir, at starvsfólkið er í støðugari menning og áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbólkar, so sum lækna, sálarfrøðing, ergo- og fysioterapeut. Saman eru vit eitt lið, sum er um hin einstaka sjúklingin.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Meira um starvið fæst at vita við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 313540, lokal 422 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 351, ella e-post **bergitw@lsh.fo**

Umsóknarfreistin er 9. februar 2004 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

## Stevningsmaður

Søkt verður eftir stevningsmanni fyri Norðoyggjar skjótast til ber.

Umsóknir vera at senda Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, Postbox 28, 110 Tórshavn innan 31. januar 2004.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært kunngerð frá Justitsministeriet frá 15. apríl 2003.

**Sorinskrivarin í Føroyum**
tann 20. januar 2004

Jørgen B. Petersen
adm.

W W W . S O S I A L U R I N . F O